**Tíðindastubbi 1: Bæði á heimasíðu og sum mail**

**Bókingar um ársskiftið**

**Fíggjarárið 2022**

Bókingar, sum skulu við í 12. tíðarskeið í 2022, skulu hava bókingardagfestingina 27.12.2022.

- Í kreditor-, verkgongdar- og debitoraskipanini skal í teigin "GL Date" verða inntøppað "27.12.2022" (ella lægri, tvs. 1. til og við 27. desember 2022) ella "12-22".
- Í høvuðsbók skal í teiginum "Period" verða inntøppað "12-22".
- Aðrar góðkendar búskaparskipanir, sum senda inn upplýsingar via webservice, skulu brúka bókingardagfestingina 27. desember 2022.

Minnist til ikki at brúka dagfestingarnar 28., 29., 30. og 31. desember sum "GL Date".

Tá ið 12. tíðarskeið í 2022 verður latið aftur, boðar Gjaldstovan, á heimasíðuni, frá, hvussu skrásett tá skal verða uppá 1. ískoytisskeið 2022 (tíðarskeið 13-22).

**Fíggjarárið 2023**

Um ávísingar skulu bókast fyri fíggjarárið 2023, verður ein dagfesting í januar 2023 sett í teigin "GL Date", t.d. "05.01.2023".

- Í kreditor-, verkgongdar- og debitoraskipanini skal í teigin "GL Date" verða inntøppað t.d. "05.01.2023" ella "01-23"
- Í høvuðsbók skal í teiginum "Period" verða inntøppað "01-23".

---

**Tíðindastubbi 2: bæði á heimasíðu og sum mail**

**Eyðmerking av skjølum, sum verða send Gjaldstovuni at skráseta**

Við ársskiftið 2022/2023 er týdningarmikið, at stovnarnir týðiliga eyðmerkja skjølini, teir senda Gjaldstovuni at skráseta – tað veri seg lønarumbønir, kreditorfakturar e.a. – á rætta fíggjarár, ávikavist "2022" og "2023".

---